## Ryggleys dýr - tilfeingi í sjónum

Hóast tað eru fiskar, ið eru megin tilfeingi í sjónum, so eru nógvar aðrar livandi verur eisini týðandi tilfeingi úr sjónum. Taraaling hevur t.d. vunnið seg nógv fram seinnu árini. Men eisini onnur dýr enn júst fiskar verða ald og veidd úr sjónum. Ryggleysu dýrini eru mong og tey eru úr mongum ógvuliga ymiskum djórabólkum. Krabbar, lindýr og tindadýr kunnu nevnast. Vit fara at hyggja nærri at fleiri av hesum í bólkum og gera eina framløgu, sum skal innihalda eitt sindur um bólkingina av hesum dýrum, hvussu dýrini liva, hvar tey liva og hvussu nógv verður veitt av teimum í heiminum og í Føroyum um hagtøl finnast.

*Mytilus edulis, Nephros norwegicus, Canser pagurus, Paralithodes camtschaticus, strongylocentrotus droebachiensis.*

Tit kunnu leita eftir dýrunum við teirra latínska navni á google og harumframt royna at finna hagtøl og annað á heimasíðuni www.FAO.org fishfinder.

Vit fara í bólkar.

Góðan arbeiðshug :)